Sosialurin

# Stórt bilblað í Sosialinum í morgin

## Mikudagin 28. oktober verður serblaðið Bilar í Sosialinum.

**Mikudagin 28. oktober** verður serblaðið Bilar sum innlegg í Sosialinum. Í blaðnum eru ummæli av fleiri **nýggjum bilum** og ymiskt tilfar um **vetrarkoyring** sum t.d. dekkskift, sporing og rustviðgerð.

Eisini er ein frásøgn frá **flogvøllinum í Vágum**, ið løgreglan nýtir sum koyritekniska breyt hjá politinum.







**Ein myndafrásøgn** er frá tá umboð fyri bólkin, sum er settur av landsstýrinum til at fyrireika eina koyrtekniska breyt í Føroyum, vóru og hugdu eftir koyritekniskum anleggum í Danmark.

**Bilurin hjá Anders And** nummar 313 var á vitjan í Havn mánadagin. Eisini eru flottir sportbilar og luksusbilar í blaðnum sum t.d. **Bugatti og Bentley.**